# Altíð pláss til ein trailara aftrat

**ÚTFLUTNINGUR** Í Hirtshals fegnast tey um avgerðina hjá Smyril Line at lata Norrønu sigla higar alt árið.
– Vit hava nú fingið eitt nýtt tilknýti til Føroyar, sigur havnarstjórin, Jens Jensen við Oyggjablaðið





FLUTNINGUR

*Havnin í Hirtshals skal gerast størsta fiskivinnuhavnin í Norður- og Vesturjyllandi í 2016. - Vit fegnast um at Smyril Line nú fer at sigla higar alt árið, sigur stjórin, Jens Jensen (innfeldur)*

Snorri Brend

**Hirtshals**: – Vit eru sjálvandi fegin um ferðafólkini, ið koma higar um summarið. Men vit vilja eisini skapa bestu umstøður fyri føroyska útflutningin av fiski, sigur havnastjórin.

Til tess at nøkta henda tørvin hevur havnin í Hirtshals verið fyri stórum broytingum og útbyggingum. So seint sum í farna mánaði var reisigildi í einum 400 fermetrar stórum rampubygningi, sum er gjørdur júst fyri at veita føroyska flutningsfelagnum bestu tænastuna.

Við hesi útbyggingini verða umstøðurnar til goymslu mundandi øktar, og eru nú omanfyri 1300 fermetrar til støddar. Men útbyggingin heldur ikki uppat við hesum.

Samstundis sum rampubygningurin hevur verið í gerð, hevur ein útvegað pláss til oman fyri 200 trailarar.

– Við hesum ynskja vit, at skapa teir karmar sum bæði Smyril Line og Smyril Blue Water hava tørv á, fyri at kunna betra um góðsflutningin millum Føroyar, Ísland og Europa, verður sagt.

### Høvuðssæti

Henda útbyggingin er kortini ikki tann einasta sum hendir á havnarlagnum í Hirtshals í hesum døgum.

Eftir at Hirtshals verður heilárlig atkomuhavn hjá Smyril Line, hevur flutningsfelagið Smyril Blue Water tikið avgerð um at flyta høvuðssætið sítt til Hirtshals.

Nú verða betri møguleikar og umstøður skaptar, soleiðis at umskipingin av fiski úr Føroyum og Íslandi og víðari til Europa, kann gerast bæði skjótt og væl.

– At vit nú flyta higar fer at styrkja Hirtshals Havn sum eitt knútapunkt fyri flutningi í Norðuratlantshavi, Norðurlondum og í Norðureuropa, verður sagt.

Hetta samsvarar eisini væl við ætlanina hjá havnini, ið miðar eftir at gerast størsta fiskivinnuhavnin í Norður- og Vesturjyllandi í 2016.



TRONGLIGT

*Í hesum lítla bjargingarbátinum yvirlivdi útróðrarmaðurin í nærum eitt samdøgur*

# Rak í bjargingarbáti í eitt samdøgur

**BJARGING** Tað byrjaði brádliga at loga umborð á bátinum. Hetta hendi so skjótt, at útróðrarmaðurin í roynd og veru bara mátti leypa í bjargingarbátin, uttan møguleika at senda út neyðarkall.

Snorri Brend

**Noreg:** Í næstan eitt samdøgur í havsneyð, rak hann runt í bjargingarbátinum, fullkomiliga yvirgivin til veður og vind.

– Tað var ótrúliga heppið at hann varð funnin, sigur Eirik Walle, sum er bjargingarleiðari í Hovedredningssentralen í Suðurnoregi, við norskar fjølmiðlar.

Næstseinasta sunnudag var tann 40 ára gamli útróðrarmaðurin úr Frøya farin til fiskiskap í ein landnyrðing úr Halten.

Tá kom brádliga eldur í 40 føtur stóra bátin. Maðurin hevði ikki annað í at velja, enn at skunda sær í lívdraktina og síðani leypa í bjargingarbátin.

– Maðurin leyp í bjargingarbátin um 10-tíðina henda sunnumorgunin. Hann hevur greitt frá, at tíð var ikki at boða frá eldsbrunanum, tá hann mátti fara av bátinum.

– Av tí at hann ikki fekk boðað frá, og tí at hann hevði sagt, at hann ikki kom aftur fyrrenn um tríggjar dagar, var eingin sum saknaði mannin, greiðir Eirik Walle víðari frá.

### Havætt

Walle heldur, at tað var satt hepni, at útróðrarmaðurin varð funnin.

– Tað var eingin skipaferðsla í økinum, meðan maðurin rak í bjargingarbátinum um náttina. Eingin hevði heldur sæð eldsbrunan umborð á bátinum.

– Hann var ótrúliga heppin, tí tað var havætt og hann rak ímóti landi. Hevði tað hinvegin verið avlandsvindur, var hann rikin til havs, greiðir Walle frá.

Útróðrarmaðurin varð noyddur at vera í bjargingarbátinum alla náttina, í heglingi, kulda og við strúki í vindi. Men árla morgunin eftir varð hann sæddur av einum brunnbáti, Ro Master, sum sigldi framvið.

40 ára gamli útróðrarmaðurin varð funnin í øllum góðum. Báturin hinvegin er ikki funnin, og er eftir øllum at døma sokkin.

– Tað seinasta sum maðurin sá av bátinum var ein stórur logi. Hann er heilt vísur í, at báturin nú liggur á havsins botni, greiðir Walle frá.

*snorri@sosialurin.fo*

**Hann var ótrúliga heppin, tí tað var havætt og hann rak ímóti landi. Hevði tað hinvegin verið avlandsvindur, var hann rikin til havs**

## Skelkandi at eingin sá hann

Skiparin á Ro Master, Håkon Wahl heldur tað vera ótrúligt, at eingin annar legði merki til bjargingarbátin.

– Tað hava uttan iva verið fleiri bátar, sum hava siglt framvið honum. So tað er nærum skelkandi, at hann ikki varð sæddur av øðrum, sigur Wahl.

Umborð á bjargingarbátinum var bæði neyðbluss og rakettir, sum vórðu brúktar, uttan at tað hjálpti.

– Tá vit funnu hann, hevði hann brúkt øll neyðblussini. Vit sóu bara ljósini frá bátinum í hesum farvatninum, sum er rættiliga ótrygt.

– Jú, tað var ikki besta farvatnið sum hann hevur rikið í: Ringur sjógvur. Nógv sker og grynnur. Og í bjargingarbátinum er bara eitt tunt "gólv", vísir Wahl á.

Tað sjáldsama við hendingini er, at útróðrarmaðurin og Håkon Wahl hava verið vinir heilt frá barnaárum.